## Morskot viknað

Tann tropiska ódnin Morskot, sum herjaði útsynningspartin av Kina um vikuskiftið, er viknað og er nú flokkað sum ein tropiskur stormur. Kinesisku myndugleikarnir fluttu næstan eina millión fólk burtur frá strondini, og sambært fjølmiðlunum kravdi ódnin eitt mannalív, og fýra fólk fingu skaða. Meiri enn 2.000 hús eru oyðiløgd, skrivar tann almenna tíðindastovan Xinhua. Áðrenn ódnin kom inn yvir Kina, hevði hon herjað Taiwan og elvt til ta ringastu vatnflóðina har tey seinastu 50 árini. Í Taiwan kravdi Murskot 12 mannalív, og 52 fólk eru ikki komin afturíaftur.



## 40 doyðu av bilbumbum

41 fólk doyðu, og minst 156 vórðu særd í tveimum bumbuatsóknum í Irak tíðliga í morgun. Í Mosul har norðuri í landinum brustu tvær bilbumbur, og sambært myndugleikunum kravdu tær 25 mannalív, og 75 vórðu særd. Næstan samtíðis var ein hørð bumbuspreinging í útsynningspartinum av Bagdad. Her doyðu 16 fólk, og 81 vórðu særd. Hetta er annar ógvusligi bumbudagurin í Irak ta seinastu vikuna. Í síðstu viku drap ein sjálvmorðsbumba 38 fólk uttan fyri eina shiamuslimska mosku í Mosul.

# Ferðsluvanlukka kravdi mannalív

**Ein ferðsluvanlukka í Vági fríggjadagin kravdi eitt mannalív, og umframt tað vóru tvey onnur ferðsluóhapp um vikuskiftið**

POLITIRAPPORTIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



- Her í Havn hevur verið óvanliga lítið at gjørt um vikuskiftið, sigur vakthavandi á politistøðini.

Talan hevur í grundini bert verið um tvær hendingar, har serliga hin eina tó var ógvuliga álvarsom.

Talan var um ein 16-ára gamlan drong, sum hótti yngri børn at sláa ein 15-ára gamlan, ella skuldi hann hølva viðkomandi av. Hetta fekk ein 13-ára gamlan at sláa tann 15-ára gamla, sum umframt sløg og spark fekk nøsina brotna. Tann 16-ára gamli er handtikin og skuldsettur fyri harðskap og hóttanir.

Í hinum førinum var talan um tveir ungar dreingir, sum koyrdu runt í Havnini í bili við einari leikaskammbyrsu, sum skjýtur plastkúlur. Skammbyrsan er gasslødd, og tí kunnu plastkúlurnar gera skaða. Hartil líkist hesin einari veruligariskammbyrsu. Teir koyrdu fram við einum pápa sum var gongutúr við seks ára gamla soninum, og teir gjørdust sum vera mann sera skakkir. Løgreglan steðgaði ungu dreingjunum, sum fingu nøkur álvarsorð við á vegnum.

Tað, sum fyrst og fremst hevur eyðkent vikuskiftið, eru ferðsluvanlukka og ferðsluóhapp.

Fríggjanáttina varð ein bilførari tikin fyri at koyra ávirkaður. Hann var komin úr norðoyatunlinum, men tá hann skuldi snara oman til Leirvíkar koyrdi hann bara beint fram og niðan í bøin. Løgreglan staðfesti, at førarin var ávirkaður.

### Doyði í ferðsluni

Um 15.30-tíðina fríggjadagin hendi ein ferðsluvanlukka suðri í Vági, sum kravdi eitt mannalív.

Ein 77-ára gamal maður kom koyrandi á einum prutli aftan fyri ein vøruvogn. Hann hyggur burtur eina løtu út á fjørðin og varnast tí ikki, at vørubilurin steðgar. Úrslitið er, at hann rennir upp í reyvina á vørubilinum og smekkar høvdið í. Maðurin varð beinanvegin fluttur á læknamiðstøðina í Vági, men var deyður, tá hann kom vegin fram. Maðurin koyrdi við ongum hjálmi, nakað sum han altíð gjørdi.

*Løgreglan hevði lítið at gera í Havn um vikuskiftið, men afturfyri hendu fleiri ferðsluóhapp, har tað eina kravdi eitt mannalív*

Seinni fríggjadagin fekk ein bilførari klipp í koyrikortið fyri at yvirhála í Hovstunlinum.

Klokkan 5.30 leygarmorgunin varð ein ung genta tikin í Klaksvík fyri at koyra við kenning, og klokkan 4 til 4.10 vórðu tveir bilførarar somuleiðis tiknir fyri at koyra við kenning inni í norðoyatunlinum.

Seinasta ferðsluóhappið hendi í vágatunlinum klokkan umleið 21.45 í gjárkvøldið, tá ein bilur rendi inn í tunnilsveggin. Maðurin varð fluttur á Landssjúkrahúsið, men slapp kortini uttan mein.

### Nýttu piparspray

Sum kunnugt hevur árligi Summarfestivalurin verið í Klaksvík um vikuskiftið, og tað gekk rímiliga friðarliga fyri seg. Bert í tí eina førinum mátti løgreglan handtaka ein mann. Hesin hevði hug at berjast, og tá løgreglan suldi handtaka mannin, skræddi hann seg leysan og rann burtur. Løgreglan fekk tó fatur á manninum, sum gjørdi so nógva mótstøðu, at løgreglan sá seg noydda at brúka piparspray móti manninum.

Hann var kortini ikki liðugur at gera um seg, og í politibilinnum á veg inn á støðina, snýsti hann sær í andlitið á einum av løgreglumonnunum. So tað er illa hugsandi, at hann sleppur snikkaleysur frá tí hendingini.

Men burtursæð frá hesari álvarsligu hendingini var bert talan um full fólk í Klaksvík, og sambært løgregluni var tað eitt stórt tal av fólki, sum hevði fingið nóg mikið innanborða. Tó fór hetta alt friðarliga fram.

# Birni eigur Rasmus

**Stóri trubadururin, Birni Dam, náddi at ódeyðiliggera seg við fleiri fólkakærum slagarum – millum aðrar Rasmus – áðrenn hann alt ov ungur fór higani**

TÓNLEIKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Næstseinasta vikuskifti var Stokkseyra festivalurin hildin við føroyskum døgum. Eisini Simme var við í sambandi við, at tað í ár eru liðin júst 50 ár síðani hann á fyrsta sinni var í Íslandi og spældi.

Høvuðssangurin var Rasmus, sum longu tá hann varð spældur inn á plátu í 1958, gjørdist ógvuliga væl umtóktur í Íslandi.

Tá vit í blaðnum fríggjadagin skrvaðu, at Simme hevði gjørt orð og lag til sangin, so er hetta ikki heilt rætt.

- Í 1956 kom Birni heim úr fjareystri, og vit fylgdust heim við Tjaldrinum úr Keypmannahavn. Har umborð var sum altíð sangur og skemt, og Birni vildi syngja ein sang, sum hann hevði royndt til eina skótaveitslu, men hann var ikki liðugur. Vit fóru niðurundir við gittara, og klokkan 4 um morgunin var hann borðbarur. Tá ið vit komu heim, gjørdi eg hann lidnan millum annað við 3. ørindi, greiðir Simme frá um upprunan til Rasmus.

Birni Dam lærdi til telegrafist og fór útlærdur burtur at sigla, men spældi saman við millum øðrum Simma, tá hann var heima.

Sum nevnt gjørdi Birni eina røð av sera væl umtóktum og nú ódeyðiligum sangum, so sum Eitt sunnukvøld í plantasjuni (ið er valdur til aldarinnar sang), Á bátadekki, Nú í kvøld, Hvønn ein mánadag og so Rasmus í Gørðum saman við Simma, umframt fleiri aðrar.

Birna Dam var tíverri ikki langt lív lagað, og hann fór higani í 1980, bert 43 ára gamal.

### Til Íslands

- Eg kom í hóslag við Connie og systkini gjøgnum musikkin í 50-unum, Birni spældi av og á í orkestri saman við mær, og Connie var uppií sanginum í Tónleikafelagnum, sigur Simme Jacobsen.

Tað var í 1956, at Rasmus í Gørðum sá dagsins ljós, og árið eftir gjørdist møguleiki fyri at taka upp og senda víðari.

- Útvarpið kom í 1957, í røttu løtu til at gera innspælingar at varpa út, og seinni at gera til grammofonplátur. Vit blivu biðin um at koma til Íslands í 1959, tí plátan við Rasmus var blivin so væl umtókt har yviri. Men tað visti so illa til, at Birni var butur, tá ið vit skuldu yvir, so eg mátti syngja Rasmus. Tað var við ringum tannabiti, men tað eydnaðist so væl, at eg tann dag í dag eri synonymur við Rasmus í Íslandi, sigur Simme Jacobsen.

Nicolina var við í ferðini og bleiv kend fyri sínar sangir, harumframt vóru Jórun Dam, systur Connie, og Jórun Dam Jacobsen, systkinabarn Nicolinu, við í ferðini, og hesar fýra settu dám á framførslurnar.



*Tveir ungir tónleikarar, Birni Dam og Simme Jacobsen*

*Myndaánari: Simme Jacobsen*

- Men sum sagt, Birni átti hugskotið til Rasmus, og vit samarbeiddu um fleiri sangir, nakað sum Lennon-Mc.Cartney, umframt at vit gjørdu sangir hvør sær, sigur Simme Jacobsen.